

*Familjan hjá orðabókasmiðinum var eisini komin við at heiðra hann. Umframt at takka føroyingum fyri heiðurin, takkaði hann eisini konuni fyri hennara tol*



*Jóhan Hendrik Winther Poulsen og Jógvan Gerðalíð vóru nakrir av røðarunum. Jóhan Hendrik, tosaði m.a. um, hvussu hann hevði fingið hugskotið til sínar orðabókasendingar úr Íslandi, og tann skjótt níti ára gamli Jógvan hugleiddi á ein skemtiligan hátt um ymisk viðurskifti, hann hevur havt við íslendingar millum ár og dag*



*Jógvan á Lakjuni og Jón Hilmar Magnusson práta saman undir móttøkuni*

# Jón Hilmar heiðraður á samkomu í Mentamálaráðnum

**Tað var ein lítillátin, men takksamur Jón Hilmar Magnusson, sum tók ímóti heiðurslønini frá Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni, týsdagin**

HEIÐURSLØN

*Theodor E. D. Olsen*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Seinnapartin týsdagin varð skipað fyri hátíðarhaldi fyri Jón Hilmari Magnussyni, í sambandi við at Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum hevði gjørt av at heiðra hann fyri sína íslendsk-føroysku orðabók. Umframt at fáa heiðurin fylgja eisini 65.000 krónur við hesi sømdargávu.

Fitt av fólki var komið saman í Mentamálaráðnum. Ein strúkikvintett úr Tórshavnar Musikkskúla spældi undan og eftir handanina av heiðursbrævinum.

Í røðu síni segði mentamálaráðharrin m.a.:

»- Heimurin gerst minni og minni, og hóast nógvir møguleikar kunnu liggja í tí, so verður trýstið á mál og mentan okkara alsamt størri. Hetta er ein gongd, sum meira enn nakrantíð áður fær okkum at ásanna, at tað ræður um at stimbra samleikan og at verja og menna mál og mentan okkara. Hesin spurningur er meira átrokandi enn nakrantíð áður í søguni hjá báðum frændatjóðum. Øll góð tiltøk, ið bera á tað rætta borðið, sum styrkja og stimbra málini og áhuga almenningsins fyri málunum, eru kærkomin. Orðabók Jón Hilmars er tí komin í tøkum tíma, og fegnast vit øll um hesa mentanarligu stórhending.

Brøðratjóðir eiga at samstarva, og vit samstarva í dag á fleiri økjum, men hetta samstarv kundi verið nógv størri og kundi fevnt um nógv fleiri øki enn í dag. Gongdin seinastu árini hevur tó víst ein vaksandi vilja til samstarv. Politiskt arbeiða vit saman í Útnorðurráðnum, og tann nýggi sáttmálin millum Ísland og Føroyar, Hoyvíkssáttmálin, er enn eitt gott dømi um hetta. Her hava vit fingið ein møguleika fyri øktum vinnuligum og mentanarligum samstarvi, og vóni eg, at hesin sáttmáli fer at bera góðan ávøkst«.

Í takkarrøðuni vildi høvundurin vera við, at hann ikki hevði hendan heiðurin uppibornan, men var sera takksamur fyri hesa viðurkenningina.

Eftir handanina var orðið frítt. Tveir, ið tóku orðið vóru Jógvan Gerðalíð, ið skemtiliga greiddi frá ymsum viðurskiftum hann hevði havt við íslendingar, og Jóhan Hendrik Winther Poulsen, sum í Føroyum í dag man vera ímyndin av orðabókaarbeiði. Hann var sjálvur við í byrjanini av arbeiðinum við at gera íslendsk-føroysku orðabókina hjá Jón Hilmari Magnussyni.

## Skráseta atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum

**MBF fer komandi tíðani at skráseta atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum í øllum kommunum í landinum. Endamálið er at gera eina »handicapguide«, har til ber at síggja, hvussu hesi viðurskifti eru og at gera kommunur meiri tilvitaðar um hendan tørvin, sigur Leila Solmunde, forkvinna í MBF**

RØRSLUTARNAÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

MBF er í ferð við at fyrireika útgávu av upplýsandi tilfari um møguleikan hjá fólki við rørslubreki at luttaka í teimum tilboðum, sum kommunan hevur at bjóða av almennum tænastum. Skrásetingararbeiðið byrjar í komandi viku.

Lagt verður fyri í Suðuroy frá 23. januar - 27. januar.

Tað eru fólk frá MBF, sum gera arbeiðið, og hava allar kommunur fingið skriv frá MBF um, at vit ynskja at koma og vitja kommununa fyri at skráseta atkomuna til almennu støðini í kommununi.

Tað er so, at í dag eru fólk við breki ofta sera virkin og ynskja at luttaka í samfelagslívinum á jøvnum føti við onnur. Hetta merkir, at tey ynskja at vera við, bæði sum vanligur borgari og sum brúkari í kommununi har tey búgva. Harumframt ynskja tey, eins og onnur, at kunna ferðast til aðrar kommunur fyri at uppliva og gera brúk av tilboðum og serkennum, ið ávísa kommunan stendur fyri.

Fyri at tryggja sær møguleikan at vera við, eru fólk við breki tí noydd at fyrireika seg væl frammanundan, tí ein sannroynd er, at ikki allar staðir er atkomuligt orsakað forðingum av ymsum slag. Í løtuni ber illa til at fyrireika seg til, hvat og hvar ein kann luttaka, og tí er umráðandi at kortleggja, hvussu tað sær út hesum viðvíkjandi.

MBF ætlar tí at útgeva eina »Handikapguide«. Ein »Handikapguide« er ein uppslagsbók, sum kunnar um, hvussu atkoman er til kirkjur, samkomuhús, skúlar, søvn, almennar stovnar, ítróttarhallir, politiskar og aðrar myndugleikar, læknar, tannlæknar, gistingarhús, matstovur o. s. fr. Atkoman skal í hesum føri uppfatast í breiðasti merking t. d. - kann ein koyristólsbrúkari ella illa gongdur sleppa framat, - eru teleslyngir tøkar til hoyritarnað ella, - er kunning gjørd atkomulig fyri deyv, blind ella menningartarnað.

– Bókin verður væntandi umleið 100 síðir til støddar og ætla vit, at hon skal koma út 24. oktober 2006, tá 25 ára stovningardagurin hjá MBF er. Vit umhugsa eisini at gera »Handikapguidina« teldutøka, tá hetta gevur møguleika at gera broytingar í bókini so hvørt sum ábøtur verða gjørdar og forðingarnar fella burtur, sigur Leila Solmunde, forkvinna í MBF.

Hon sigur eisini, at tey eru tó av teirri áskoðan, at bókin eisini kann gerast eitt hent amboð fyri allar aðrar borgarar í landinum, umframt ferðafólk, ið koma uttanífrá. Harumframt halda tey, at bókin kann verða eitt gott amboð hjá kommununum at gerast tilvitaðar um støðuna í kommununi og harvið fáa møguleikan fyri at taka burtur forðingar.

– Tá vit tosa um atkomuviðurskifti, eru vit ofta samd um, at støðan er ov vánalig. Nú fáa vit so staðfest, hvussu stendur til á økinum, og meta vit at hetta bert kann styrkja framtíðargongdina viðvíkjandi atkomuviðurskiftum í Føroyum, heldur hon.

MBF er av teirri fatan, at kommunurnar eins og landið, eiga at ganga undan at taka burtur forðingar í samfelagnum, og kann hetta tá smitta av sær, so privat virkir eisini vilja gera sítt til at vera við til at gera Føroyar til eitt land við góðum umstøðum at virka undir fyri fólk við breki.

## Fiskirannsóknarstovan mátað sjógvin

**Nýggjar kanningar vísa, at at hitin við Skopun broytist javnari ella meiri líðandi enn hitin við Oyrargjógv**

GRANSKING

*Theodor E. D. Olsen*

Fiskirannsóknarstovan hevur hitamátarar liggjandi við Oyrargjógv og Skopun, ið støðugt máta hitan í sjónum, og kanningar haðani vísa, at hitin er áleið tann sami í báðum støðum.

Í kunningarskrivi frá Fiskirannsóknarstovuni verður greitt frá, at orsøkin til hetta er, at sjógvurin innast á landgrunninum - tvs. sjógvurin innan fyri umleið 100 metra dýpi, men tó ikki við sjógv inni á firðum o.l.- verður væl blandaður av sjóvarfalli.

Hitamátararnir, sum eru settir út við Oyrargjógv og Skopun, eru sjálvvirkandi. Teir máta hitan við jøvnum millumbili, og goyma síðan mátingarnar í minninum. Okkurt um tvær ferðir um árið verða mátararnir skiftir, og mátingarnar lisnar inn á teldu á Fiskirannsóknarstovuni. Við Oyrargjógv eru mátingarnar tryggjaðar á tann hátt, at har altíð eru 2 – 3 mátarar, um so skuldi borist á, at ein teirra gongur fyri. Í Skopun er í løtuni bara ein mátari.

Sambært kanningunum vísa tølini, at hitin við Skopun broytist javnari ella meiri líðandi enn hitin við Oyrargjógv. Hetta bendir á, at sjógvurin í Skopunarfirði er betur blandaður enn í Vestmannasundi. Tó kann munurin eisini stava frá, at mátarin við Oyrargjógv er á umleið fýra metra dýpi og liggur nærri landi, enn mátarin við Skopun, ið mátar hitan í sjógvi frá 18 metra dýpi.

Tøl frá Fiskirannsóknarstovuni, ið vísa miðalhitan í sjónum við Oyrargjógv frá 1. januar í fjør, verða eisini samanborin við miðalhitan í sjónum við Mykineshólm hvønn mánaða frá 1914 til 1969. Hesi tøl vísa, at hitin við Oyrargjógv í 2005 var eitt lítið vet hægri, enn hitin við Mykineshólm fyrra helming av 20. øld.